# Bygdalega í Nesvík

**Um vikuskiftið varð skipað fyri legu fyri bygdunum báðum í Hvannasunds kommunu í Nesvík**

BYGDALEGA
*Orð: Solby A. Eliasen*
*Myndir: Jens K. Vang*



Umleið 240 fólk úr bygdunum Hvannasund og Norðdepil fóru fríggjadagin til Nesvíkar á legu. Tað búgva umleið 400 fólk í báðum bygdunum, so tað merktist væl, at yvir helmingurin var farin av bygdunum um vikuskiftið. Sagt varð í skemti, at onkur mátti vera eftir og sløkkja í Hvannasundi, tí har var meginparturin av bygdini farin avstað. Og hóast streymurin hevur verið góður hetta vikuskiftið, so valdu flestu av útróðrarmonnunum í Hvannasundi at lata bátarnar liggja og heldur fara á legu í Nesvík. Tá tey komu til Nesvíkar fríggjakvøldið var samansjóðing og onkur kapping á skránni. Síðani vórðu myndir frá tí fyrstu leguni vístar.

Leygardagin vóru tey í gongdi allan dagin. Har var mangt og hvat á skránni. Kappingar og uppgávur av ymsum slag. Eisini var ein áhugatími, har evnið var sorg. Tað var Jógvan Fríðriksson, sum hevði hann. Fyriskipararnir royna at hava evni, sum røra øll, og sum Bíblian kann knýtast til. Eisini var ein fótbóltkapping fyri menn, kvinnur og børn leygardagin. Um kvøldið ótu tey ræst kjøt, sum menn úr bygdunum báðum høvdu latið. Og tá var eisini undirhald, til dømis ein mótasýning av klæðum frá sjeyti-árunum og innsløg frá degnum.

Sunnudagin var lestur um morgunin og aftaná døgurða høvdu tey eisini sunnudagsskúla, áðrenn leiðin gekk norðureftir aftur.

Fyriskiparar av leguni, sum hevur verið hildin seinastu fýra árini, eru Pól Johannesen, trúboðari í KFUM í Klaksvík, Sigbjørg Olsen og Alith í Frammistovu við familjum. Pól sigur, at tað hevur verið vanligt at skipa fyri tílíkum legum fyri til dømis KFUM og K, men so hugsaði hann við sær sjálvum, at tað kundi verðið eins stuttligt at skipa fyri eini legu fyri bygdini. Og tað royndi hann so fyrstu ferð í 1999, og væl hevur eydnast. Fyrsta árið vóru tey 170 og undirtøkan er bara voksin fyri hvørja ferð. Hesuferð vóru tey so 240 í tali.

– Endamálið við eini tílíkari legu er at grannar og bygdafólk skulu koma nærri hvørjum øðrum og eisini nærri Gudi, sigur Pól Johannesen, sum heldur at legan var væleydnað, og leguhúsið í Nesvík, sum er nógv umbiðið er longu bílagt til leguna í 2004.







# Stummann er óynsktur á Fornminnissavninum



*Arne Thorsteinsson og hini starvsfólkini á Føroya Fornminnissavnið kenna seg sum gíslar í einum politiskum spæli, har tey fara at sita eftir við svartaperi.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Starvsfólkið á Føroya Fornminnissavni fáa um eina viku nýggjan stjóra. Men hesin er so óynsktur sum tilber**

LANDSANTIKVARUR
*Heri á Rógvi*

Um eina viku stendur ein maður á trappuni uttan fyri Fornminnissavnið í Hoyvík. Hesin maðurin eitur Steffen Stummann Hansen, og hann skal vera stjóri á stovninum. Hann hevur verið ein av høvuðspersónunum í mest umstrídda og mest almenna setanarmálinum í longri tíð.

Men starvsfólkið á Fornminnissavninum sita ikki beinleiðis og gleða seg til teirra nýggi leiðari kemur.

Starvsfólkið á Fornminnissavninum hevur áður gjørt vart við sína misnøgd, og nú venda tey sær aftur til løgmann og fyribils mentamálaráðharran, Høgna Hoydal.

Sagt verður í skrivum til teir báðar millum annað:

»Tað hevur alstóran týdning at virða starvsfólkapolitikkin, verja sálarliga arbeiðsumhvørvið og endurreisa álitið á setanarskipanina. Hetta gerst ikki uttan at setanin verður ógildað, tí eingin – og als ikki starvsfólk stovnsins – kann liva við einum stovnsleiðara, ið er settur á ein hátt, sum sambært løgmanni sjálvum hevur sett trúvirðið á okkara umsiting í vanda.

Vit ivast ikki í, at málið verður viðgjørt við fyriliti fyri almenna stovninum og starvsfólkinum har heldur enn fyri møguligum fíggjarligum avleiðingum, ið kunnu standast av at gera tað, sum rætt er. Mist trúvirði og týnt sálarligt arbeiðsumhvørvi fara eisini í longdini at hava størri útreiðslur við sær enn tað, tað møguliga fer at kosta at rætta teir skeivleikar, ið gjørdir eru. Tí heita vit inniliga á tygum, at ógilda setanina hjá fyrrverandi landsstýrismanninum av nýggjum landsantikvari.«

### Gíslar

Arne Thorsteinsson, eitt av starvsfólkunum á stovninum og fyrrverandi landsantikvarur, sigur, at øll tey føstu starvsfólkini á stovninum hava skrivað undir áheitanirnar.

– Vit kenna okkum sum gíslar í einum politiskum spæli, sum vit als ikki skilja. Tá løgmaður hevur tikið hetta stigið, hví skulu vit so sita eftir við svartaperi, sigur Arne Thorsteinsson.

Hann kallar støðuna fyri groteska, og hann sigur, at tey skilja einki.

Sum tað sær út hava starvsfólkini kortini ikki annan møguleika enn at mótmæla við skrivum av hesum slag. Starvsfólkini fáa illa boykotta stovnin, men tey rokna við týndum sálarligum umvhørvi, sum tikið verður til í skrivinum til landsstýrismannin og løgmann.

# Felagið Tórshavn víðkar sjónarringin

**Arbeitt verður við at seta eitt áhugafelag á stovn fyri ferðavinnuna í allari Streymoynni. Hetta var eitt mál á skránni, tá Felagið Tórshavn helt aðalfund um vikuskiftið**



*Mentanarnáttin er eitt av tiltøkunum, sum Felagið Tórshavn skipar fyri í ár. Felagið ynskir, at hetta skal vera fastur táttur, og í fjør var áhugin stórur.*
*Mynd: Álvur Haraldsen.*

AÐALFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Leygardagin hevði Felagið Tórshavn aðalfund. Felagið virkar fyri at skipa fyri tiltøkum í høvuðsstaðnum og at vekja um áhugan fyri mongu tilboðnum í landsins størstu kommunu.

Fremsta aktivið hjá felagnum er Kunningarstovan. Um veturin starvast 2,5 fólk á Kunningarstovuni, og um summar eru tey fimm til arbeiðis. Hetta er høvuðsorsøkin til, at Felagið Tórshavn arbeiðir við einari fíggjarætlan, ið eftir ætlan javnvigar við 1,4 mió.

Kunningarstovan fær stuðul frá Tórshavnar kommunu, og Ferðaráðið veitir eisini eitt sindur av stuðuli.

Kunningarstovan hevði 27.000 vitjanir í fjør.

Ingigerð á Trøðni, sum er skrivari fyri felagið og starvast á Kunningarstovuni, sigur, at aðalfundir var sum aðalfundarnir plaga at vera.

Felagið hevur fleiri ætlanir fyri hetta árið. Teir kendu gongutúrarnir vera aftur á skránni.

– Vit fara at ganga runt um kommunumarkið hjá Tórshavnar kommunu. Tað er langur teinur, og vit ætla at royna at náða allan vegin runt, sigur Ingigerð á Trøðni.

Fyri uttan at gongutúrar, so hevur felagið eisini størri verkætlanir í huganum.

– Vit vilja fegin gera nakað við gøturnar kring Havnina. Eitt nú til Kirkjubøar er standurin ringur tað mesta av leiðini, og hetta vilja vit fegin hava gjørt nakað við, sigur Ingigerð á Trøðni.

Hon leggur afturat, at her verður neyðugt hjá kommununi at gera arbeiðið, og felagið vil gera vart við støðuna og gera uppskot til møguligar betringar.

Felagið Tórshavn er eisini ein av stigtakurum til at fáa gjørt eitt felag fyri alla Streymoynna við tí fyri eyga at stimbra tiltøk og ferðavinnu.

– Greitt er, at útboði í Vestmanna og aðrastaðni og Norðstreymoy er ov lítil til at kunna fíggja eitt felag, og tí má stuðul frá kommunum til, sigur Ingigerð á Trøðni.

Enn er tað mesta ógvuliga ógreitt viðvíkjandi hesum nýggja felagið, tí finnast skal útav, hvussu skipast skal fyri og ymiskt annað.

Av øðrum tiltøkum, sum Felagið Tórshavn hevur í kvittani, kunnu nevnast Mentanarnáttin, sum verður 6. juni, og sum hevur verið á skránni seinastu tvey árini eisini. Somuleiðis ætla limirnir í felagnum sær at ferðast úr Fugloynni til Mykinesar. So vítt gjørligt verður ferðast til gongu, men uttan andaliga hjálp verður neyðugt at nýta Strandferðsluna sjóvegis.

### Nevnd

Eingin aðalfundur uttan eitt nevndarval, og soleiðis var eisini hjá Felagnum Tórshavn. Formaðurin í felagnum flytir burtur, og tískil má nýggjur finnast. Thordur Thorsteinsson hevur verið formaður, men enn er eftirmaðurin ikki funnin, tí nevndin ikki hevur skipað seg. Hetta verður væntandi gjørt seinni í vikuni.

Nevndin er nú mannað við: Àsmundi Joensen, Juttu Midjord, Kristiannu Høgnesen, Johan Mortensen, Anidu Johannesen, Ega Dam og Jákupi Simonsen.

Kristianna Høgnesen er formaður fyri starvsnevndina hjá felagnum, og Ingigerð á Trøðni skrivari.

# Eitt sindur um skatt

*KPMG gevur aftur í ár út bóklingin »Eitt sindur um skatt«.*




KPMG hevur útgivið árliga bóklingin um skattaviðurskifti. Bóklingurin kallast eitt sindur um skatt, og tað er eisini tað, lesast kann um í bóklinginum.

Til ber at lesa um ymisk skattaviðurskifti – bæði hjá einstaklingum og virkjum. KPMG sigur í skrivi, at bóklingurin bert umfatar føroysk skattaviðurskifti, og hann fevnir ikki um øll skattaviðurskifti.

Men sagt verður frá eitt sindur um skatt.

**-HR**